# Nýtt fiskavirki letur upp á Toftum




*Jóhannus Olsen undir skeltinum, sum hongur á nýggja virkisbygninginum hjá P/F Snodd*

**Samstundis, sum P/F Snodd nú fer at økja um sítt virksemi, fer felagið eisini at bjóða virkisorkuna, sum er til avlops, út til aðrar, sum hava áhuga fyri at nýta ta tænastu, sum P/F Snodd kann veita. - Sum er, hava vit nøkur fólk í arbeiði í leigaðum hølum á Glyvrum, men nú hava vit so brúk fyri einum 10-15 fólkum aftrat, sigur Jóhannus M. Olsen, stjóri**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*

Síðsta hósdag vísti stjórin hjá P/F Snodd, Jóhannus M. Olsen, Sosialinum nýggja og snotuliga virkið, sum felagið hevur bygt á ídnaðarøkinum norðanfyri Toftagjógv.

Bygningurin er 900 fermetrar til støddar, harav sjálv virkishøllin er 700fermetrar. Í teimum seinastu 200 fermetrunum í vestara enda, er gólv lagt í, so her eru tvær hæddir, sum eru 200 fermetrar hvør.

Skrivstovur, matarhøli, skiftirúm, wc og brúsurúm eru rúmlig, og gott útsýni er úr vindeygunum suðureftir og vestureftir.

At síggja til, er bygningurin gjørdur úr góðum tilfari, og í vestara enda er betong gólv millum hæddirnar.

Fuglø Arkitektar hava teknað bygningin, og tað er Haldur Vang, timburmeistari, sum hevur staðið fyri byggiarbeiðinum. Aftrat sær hevur hann havt aðrar veitarar, eitt nú til el, hita, sanitet og máling.

Jóhannus Olsen, sum er stjóri hjá P/F Snodd, sigur, at tað er ein tíð síðan, at henda byggiætlan var í stoypiskeiðini; tá høvdu teir ymiskar tekningar á borðinum, og nú stendur bygningurin at kalla liðugur. Bert okkurt smávegis er eftir at gera.

Stólar og borð eru komin til kantinuna.




*Bygningurin, sum P/F Snodd hevur bygt á Toftum, er 900 fermetrar stórur. Vestasti parturin er í tveimum hæddum*

## Skilji-og pakkilinja

P/F Snodd hevur í fleiri ár keypt feskan fisk, sum verður pakkaður og sendur av landinum. Felagið byrjaði í Turkihúsinum í Oyrunum, men í eitt gott ár hevur felagið húsast í leigaðum hølum á Bakka á Glyvrum.

Tá ið Sosialurin hugdi fram við seinasta hósdag, stóðu nøkur kør við fiski inni á gólvinum. Her vóru fleiri sløg av fiski, eitt nú hýsa, toskur, havtaska og



tunga.

Jóhannus sigur, at felagið keypir at kalla øll fiskasløg, men higartil hava teir ikki gjørt so nógv við upsan.

- Men nú nýggja virkið kemur ígongd, og kapasiteturin verður nógv størri, fara vit eisini at skilja og pakka upsa, sigur hann.

Nýggja virkið á Toftum er útgjørt við eini stórari skilji-og pakkilinju, sum kenda og framkomna fyritøkan, Marel í Íslandi, hevur gjørt. Formula fo. umboðar Marel í Føroyum, og saman við einum íslendingi, vóru teir á Toftum, tá ið linjan varð sett upp.

## Tænastustøð

Herfyri lýsti P/F Snodd eftir fólki at arbeiða á virkinum.

- Sum er, hava vit nøkur fólk í arbeiði, og vit hava brúk fyri 10-15 fólkum aftrat, bæði kvinnum og monnum. Fleiri hava ringt og spurt seg fyri um arbeiði, sigur stjórin.

Tilsamans fara eini 20 fólk at starvast hjá P/F Snodd.

Jóhannus sigur, at kapasiteturin at skilja og pakka fisk nú verður so stórur, at teir fara at veita tænastu til aðrar, sum vilja samstarva um teir møguleikar, sum felagið nú hevur útvegað sær so tætt uppat Fiskamarknaði Føroya.

- Vit fara at halda fram at keypa fisk sum higartil, og væntast kann, at nøgdirnar verða størri, enn tær hava verið, men vit koma neyvan nakrantíð einsamallir at gera nýtslu av øllum kapasitetinum, sum virkið hevur.

- Tí fara vit at bjóða okkum fram til samstarv við aðrar, sum keypa feskan fisk, sum verður skildur og pakkaður eftir ynskjunum hjá hvørjum kunda sær, sigur Jóhannus og leggur aftrat, at P/F Snodd fer at veita sínum viðskiftafólki eina so góða tænastu sum gjørligt.

## Ógvuliga spentur

Spurdur, um hann gleðir seg til nýggju hølini og nýggju møguleikarnar, sigur stjórin

- Ja, hetta verður sera spennandi, eingin ivi um tað.

Jóhannus sigur, at íslendska skilji-og pakkilinjan er royndarkoyrd, bæði í Føroyum og Íslandi, og linjan virkar væl.

- Vit eru væl nøgdir við tað, vit hava sæð, sigur stjórin.

Virkisleiðari hjá P/F Snodd er Dánjal Hansen av Glyvrum, og Páll Solmunde úr Søldarfirði er arbeiðsformaður.

Felagið sendir megin-partin av fiskinum niður á fiskamarknaðin, Fish Gate í Hull, har beiggi Jóhannus, Jens Christian Olsen, er stjóri.

- Fiskurin fer ísaður og pakkaður við teimum trimum skipafeløgunum, vit hava, Skipafelag Føroya, Eimskip og Smyril Line. Vit kundu hugsað okkum, at fráferðirnar vóru meira skiftandi, soleiðis at betri møguleikar vóru at sent fisk av landinum fyrr í vikuni. Sum er, eru næstan allar fráferðirnar síðst í vikuni, sigur Jóhannus Olsen, stjóri.



*Tveir ungir arbeiðsmenn í fiskakjallaranum á Bakka á Glyvrum, har P/F Snodd hevur leigað seg inn seinasta árið*

Umboð fyri
Perkins



AWI BOATS SERVICE SP/F
620 Runavík • tlf. 448585 • fax 448785
awi@post.olivant.fo




...har hugskot gerst veruleiki
- bæði á sjógvi og landi

Vit veita tær neyðuga ráðgeving, so tú kanst kenna teg tryggan, tá talan er um:

- Fígging til íløgur ella rakstur
- Samskifti við útheimin, eitt nú tá talan eru gjaldoyra og rembursir
- Ábyrgdir, tað veri seg gjalds- ella arbeiðsábyrgdir

| Starvsfólk | Telefon nr. | Teldupostur |
| --- | --- | --- |
| Eyðfinn Reyðberg, *stjóri* | 475000 | eydfinn@ns.fo |
| Eyðun Kjølbro, *vinnukundaleiðari* | 475055 | eydunk@ns.fo |
| Guðrið Lava Olsen | 475052 | gudrid@ns.fo |
| Julianna Thomsen | 475012 | julianna@ns.fo |

Ósávegur 1 Postboks 149 FO-700 Klaksvík Tel: 475000 Fax: 476000
Teldupostur: ns@ns.fo www.ns.fo